## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av norði, seinnapartin minni vindur. Sólglottar, men eisini okkurt ælið og hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi, seinnapartin lækkar hann niður í landsynning. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Lot til andøvsgul av eystri og landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 13 stig.




# Miðbýurin í Klaksvík undir taki

1000 fermetrar av miðbýnum í Klaksvík eru lagdir undir tak í sambandi við Summar Festivalin.

Tjaldið skal hýsa Flagspallinum, har fleiri føroyskir bólkar fara at spæla fríggjakvøldið og leygarkvøldið.

**Tjaldið stendur við fótbóltsskýlið.**
Talan er um eitt spildurnytt tjald, sum er leigað úr Danmark, og tað hevur bara einaferð áður verið sett upp.

Á festivalum uttanlands er tað vanligt við slíkum tjaldum. Tey skapa ein rættan festivalhýr, og kunnu jú eisini brúkast, um tað er vátt í veðrinum. Tað verður neyvan aktuelt í Klaksvík, tí veðurforsaginin er góð og sigur turt og gott veður um vikuskiftið.

Tað passa fleiri enn 3000 fólk inn í tjaldið

Í tjaldinum verður ókeypis festivaldansur bæði fríggjakvøldið og leygarkvøldið eftir konsertirnar á festivalinum.

**Hópin av bátum á Summar Festival**
Ein 30 bátar hava biðið um pláss við havnarlagið í Klaksvik í sambandi við Summarfestivalin, sum verður um vikuskiftið

Í hesum døgum verður stákast óført í Klaksvík. Tann stóri pallurin verður settur upp við Sandin, Silvapallurin verður settur upp við Gamla Kirkjugarð og eitt yvirvaksið telt, sum er 48 x 21 m verður sett upp við skýlið. Hetta verður kallað Flags-pallurin.

Havnarlagið verður eisini umskipað nakað. Ætlanin er at útvega øllum bátunum, sum vanliga liggja við norðastu bátabryggjuna á eystursíðuni, annað pláss. Á henda hátt verður pláss fyri eini 16 bátum har.

Dýpt er frammanfyri nýggju oljukeiina hjá Shell, sum liggur beint sunnanfyri ferjuleguna, so har kunnu nógvir bátar liggja. Uttaná Draganum er pláss fyri nøkrum bátum eisini. Restin kann so liggja heimanfyri bryggjuna, har Dúgvan leggur at.

Á henda hátt verður hildið, at til ber at fáa í minsta lagi 30 smábátar at liggja væl í Klaksvík.

Umráðandi er, at bátarnir seta seg í samband við Klaksvíkar Havn, so greiða kann fáa á hesum viðurskiftum, og um møguliga er neyðugt at liggja aðrastaðni eisini.

Til høvið er lagt serlig elveiting og vatn oman á bryggjurnar. Klaksvíkar Havn metur, at møguleikar skuldu verið fyri einum hugnaligum umhvørvið við havnarlagið í Klaksvík til Summar Festivalin 2005.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 8 |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | -- |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 13 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 22 |
| Tromsø | 11 |
| Bergen | 12 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 20 |
| Keypmannah. | 18 |
| Helsinki | 19 |
| Moskva | 21 |
| Berlin | 17 |
| Warzawa | 27 |
| Kiev | 25 |
| Bukarest | 29 |
| Paris | 24 |
| Madrid | 28 |
| Róm | 24 |
| Malorca | 28 |
| Athen | 33 |
| Malta | 35 |
| Tunis | 27 |
| Beijing | 30 |
| New Dehli | 35 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 17 |
| New York | 35 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | 22 |
| Panama | -- |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 22 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1000 hPa. í landnyrðing úr Føroyum fer spakuliga í landnyrðing.




**Í dag:**
Lágtrýstið yvir Norska Havinum fer í landsynnig. Hátrýstið vestan fyri Ísland fer spakuliga eystureftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 3/8 kl. 06[00]– 4/8. 06[00]. Hitin í gjár: 11,9°
Minsti hiti máldur í aug.: 0,2° - Mesti hiti máldur í aug.: 22,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 8,0 mm – mált frá 3/8 kl. 06[00]– 4/8 kl. 06[00]
Avfallið higartil í august: 16,2 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

4. august — Mánin longst frá jørðini
5. august — Tendring

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 5. aug | 07.58 | 20.18 | 06.58 | 19.18 | 07.13 | 19.33 | 09.58 | 22.18 | 10.58 | 23.18 | 06.13 | 18.33 | 05.13 | 17.33 | 08.13 | 20.33 | 09.13 | 21.33 | 07.43 | 20.03 | 08.58 | 21.18 |
| 6. aug | 08.37 | 20.56 | 07.37 | 19.56 | 07.52 | 20.11 | 10.37 | 22.56 | 11.37 | 23.56 | 06.52 | 19.11 | 05.52 | 18.11 | 08.52 | 21.11 | 09.52 | 22.11 | 08.22 | 20.41 | 09.37 | 21.56 |
| 7. aug | 09.14 | 21.32 | 08.14 | 20.32 | 08.29 | 20.47 | 11.14 | 23.32 | - | 12.14 | 07.29 | 19.47 | 06.29 | 18.47 | 09.29 | 21.47 | 10.29 | 22.47 | 08.59 | 21.17 | 10.14 | 22.32 |
| 8. aug | 09.49 | 22.06 | 08.49 | 21.06 | 09.04 | 21.21 | 11.49 | - | 00.32 | 12.49 | 08.04 | 20.21 | 07.04 | 19.21 | 10.04 | 22.21 | 11.04 | 23.21 | 09.34 | 21.51 | 10.49 | 23.06 |
| 9. aug | 10.22 | 22.39 | 09.22 | 21.39 | 09.37 | 21.54 | 00.06 | 12.22 | 01.06 | 13.22 | 08.37 | 20.54 | 07.37 | 19.54 | 10.37 | 22.54 | 11.37 | 23.54 | 10.07 | 22.24 | 11.22 | 23.39 |

**ÚF**
**Morgunlestrar**
**25., 28. og 30. juni**

***Hallgrím Johannesen á Skála lesur***

**Sálmar:**

**Mánadagin 8. august:**
nr. 19 Nú takkið Gudi øll
nr. 2 Lovsyng tínum Harra

**Týsdagin 9. august:**
nr. 516 Ljósið rann av kærleiks runni
nr. 22 Harrin signi oss og ráði

**Mikudagin 10. august:**
nr. 289 Eg veit eitt land, har vakurt er

**Hósdagin 11. august:**
nr. 271 Eg fátækur snúgvi mær, faðir
nr. 21 Algóði faðir, tú yndismilt bendir

**Fríggjadagin 12. august:**
nr. 235 Halgi andi, kom tú inn
nr. 237 Andanna andi

**Leygardagin 13. august:**
nr. 550 Nú rennur sólin fríð




um...
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
...er lisin
-so ert tú við!

5 707265 100050 >